# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*-Tað skal ikki vera nakað dulsmál, at eg hati at tapa, men tað er best fyri landið og flokkin, at eg gevist nú*

*(Mitt Romney)*

# Sótu innikavað í bilinum í 10 samdøgur

**Søgan um amerikonsku hjúnini Thomas og Tamithu Garner er næstan ótrúlig. Í bítandi kulda sótu tey innikavað í bilinum á einum vegi í statinum Utah í samfull 10 samdøgur og bíðaðu eftir, at onkur skuldi koma fram á tey. Tann 10. dagin gjørdu tey av at fara at leita eftir hjálp, og tann 12. dagin kom ein maður fram á tey. Tá høvdu Thomas og Tamitha Garner mist alla vón um bjarging, og tey høvdu eisini skrivað testamentið.**



## Ill kvinna leyp á flogskipararnar við knívi

**Tað eydnaðist tveimum nýsælendskum flogskiparum at seta flogfarið í øllum góðum, hóast ein kvinna hevði stungið báðar við knívi**

Flogfarið var í innanríkisrutu frá Blenheim til Christchurch í Ný Sælandi, tá ein kvinna, sum var millum ferðafólkini, leyp á teir báðar flogskipararnar við knívi, samstundis sum hon hótti við at spreingja flogfarið í luftina - ella rættari sagt luftini.

Tað eydnaðist teirri 33 ára gomlu kvinnuni stinga annan flogskiparan í aðra hondina, og síðani stakk hon hin flogskiparan í annað beinið. Undir álopinum rópti hon, at hon hevði lagt eina bumbu í flogfarið.

Tað eydnaðist at fáa bilbukt við kvinnuna, sum bleiv tikin, so skjótt flogfarið hevði sett seg. Løgreglan sendi fólk og hundar umborð á flogfarið at leita eftir bumbuni, men har var eingin bumba.

Sum skilst er álopskvinnan upprunaliga ættað úr Somalia.

# Natascha Kampusch ætlar at stevna løgregluni

**Natascha Kampuch, sum var gísli í átta ár, er so misnøgd við arbeiðið hjá eysturríksku løgregluni, at hon umhugsar at stevna**



Sveik eysturríkska løgreglan, og var hon viðvirkandi til, at Natascha Kampusch var gísli í einum kjallararúmi í Wien í samfull átta ár? Tann spurningin reisir Natascha sjálv nú, og hon umhugsar tí at biðja sín verja leggja sak ímóti eysturríkska statinum.

- Eg eri bæði skelkað og ill, sigur Natascha Kampusch, sum fyllir 20 í næstum. Fyri hálvum øðrum ári síðani fór navn hennara sum eldur um allan heimin, tá tað eydnaðist henni at flýggja frá Wolfgang Priklopil, sum burturflutti hana í 1998. Tá hon var flýdd, beindi hann fyri sær.

Natascha Kampusch og verji hennara hava illgruna um, at eysturríkska løgreglan gjørdi fleiri mistøk, tá hon kannaði málið, men at innanríkisráðið legði lok á alt fyri at forða fyri einari politiskari gølu upp undir tjóðartingsvalið á heysti í 2006. Eitt innanhýsisskjal, sum ein tingmaður hjá Teimum Grønu hevur lagt fram, bendir á, at løgreglan longu í 1998 fekk eina ábending um, at tað kundi vera Wolfgang Priklopil, sum hevði burturflutt Nataschu Kampusch. Men løgreglan slepti málinum.

- Vísir tað seg, at løgreglan kundi havt funnið gentuna beinanvegin við at kanna málið til fulnar, fara vit at leggja sak, sigur verjin hjá Nataschu Kampusch, Gerold Granger, við blaðið Der Standard.

Eysturríkski innanríkisráðharrin, Günther Platter, sum tók við aftan á valið í 2006, hevur sagt, at málið skal kannast út í æsir. Hann er eisini sinnaður at biðja óvildugar serfrøðingar taka sær av kanningunum.

*Natascha Kampusch kundi kanska verið funnin beinanvegin. Ístaðin fyri var hon gísli í átta ár (Mynd: Polfoto)*

## STUTT SAGT

### Lowassa fer frá

Forsætisráðharrin í Tansania, Edward Lowassa, bað í gjár um at verða loystur úr embætinum sum stjórnarleiðari. Orsøkin er, at forsætisráðharrin er lagdur undir at hava endurnýggjað ein sáttmála við amerikanska elfelagið Richmond, hóast felagið als ikki hevur hildið skyldurnar í tí gamla sáttmálanum. Tey atfinningarsomu vísa á, at Richmond var ikki ført fyri at veita ta neyðugu el-megina, tá Tansania kom í neyð av turki fyri tveimum árum síðani, hóast felagið hevði lovað at útvega landinum elmegi. Kortini endurnýggjaði stjórnin sátttmálan við felagið, men nú kostar tað so Lowassa sessin sum stjórnarleiðari, skrivar AFP.

### Í rættin fyri mótmæli

Tvey fólk, sum vórðu tikin í sambandi við eitt mótmælistiltak uttan fyri japonsku sendistovuna í London fyri einum mánað síðani, komu í gjár fyri rættin. Tey bæði, ein 50 ára gamal maður og ein 14 ára gomul genta, mótmæltu japonsku hvalaveiðini í Suðurhøvum við at leinkja seg í girðingina við japonsku sendistovuna. Dómur fellur væntandi um eina viku. Í rættinum kom fram, at japonsku hvalabátarnir hava tikið veiðina uppaftur, nú skip hjá Greenpeace og Sea Shepherd eru farin inn at bunkra.

### Stríð um gamlan film

Tað hevur elvt til øsing í Niðurlondum, at ein sjónvarpsstøð ætlar sær at senda pornofilmin ”Deep Throat”, sum varð gjørdur fyrst í sjeytiárunum, og sum av mongum verður roknaður sum tann fyrsti av sínum slagi. Mentamálaráðharrin vil ikki áleggja sjónvarpinum at taka filmin av skránni. Jan Peder Balkemende, forsætisráðharri, ætlaði sær at gera tað, men tað hevði verið í stríð við galdandi fjølmiðlalóg, so hann hevur slept sínari ætlan.